# Smyril liðugur í næstu viku

*Arbeiðið uppá Smyril á skipasmiðjuni á Skála gongur sum ætlað. Men skuldi tað endað galið, fer Claymore ongan veg*

ÁKI BERTHOLDSEN

Arbeiðið upp á Smyril á skipasmiðjuni á Skála, gongur sum ætlað.

–Tey feskastu boðini av Skipasmiðjuni á Skála siga, at Smyril verður liðugur til avtalaða tíð, sigur Magnus Magnussen, tekniskur stjóri á Strandferðsluni.

– Avtalan við skipasmiðjuna var, at Smyril skuldi vera liðugur tann 21. juni, tað er týsdagin, og tað fer at halda.

– Men so er eftir at vaska og rudda, áðrenn hann verður settur í sigling aftur.

Men hendir ikki okkurt heilt óvæntað, verður Smyril settur aftur í sigling mitt í komandu viku.

Sostatt skuldi ongin vandi verið fyri jóansøkuni, sum verður í Vági komandi vikuskiftið.

Uttan at fara í smálutir, sigur Magnus Magnussen, at tað eru stórarbeiði, sum eru gjørd uppá Smyril hesa tíðina, hann hevur verið á beding.

Nú verður hann málaður, umframt at teppi skulu skiftast o.s.fr.

–Men tað hava verið langir arbeiðsdagar á skipasmiðjuni, heilt upp í 16 tímar, tí tá ið eitt so gamalt skip verður kannað, er altíð okkurt óvæntað at finna, sum eisini skal gerast.

Tað einasta, sum hevur verið eitt sindur „spennandi“, er, at stabilisatorararnir hava ikki virkað.

– Ein serkønur breti skuldi koma til Føroyar at kanna teir hesa vikuna.

–Men eftir, at hann hevur kannað málið, er tað nú greitt, at brekið er ikki so álvarsligt, at tað broytir, sigur Magnus Magnussen.

### Claymore ongan veg

Annars hevur tað gingið sum rótasúpan í Suðuroy, at avloysaraskipið hjá Smyrli, Claymore, er selt, og skal undir øllum umstøðum av landinum longu mánadagin.

Men hetta avsannar Magnus Magnussen avgjørt.

–Eg kann vissa suðuroyingar um, at Claymore fer ongan veg, fyrrenn Smyril er komin aftur í sigling.

Hann sigur, at Strandferðslan hevur leigað Claymore í seks vikur.

– Men vit hava rætt til at leiga hann í 30 dagar afturat.

– Sostatt kunnu vit, í ringasta føri hava Claymore til síðst í juli mánaða, um so skuldi verið, sigur Magnus Magnussen.

*Politikarar hava funnist at tykkum fyri at koyra Smyril á beding á hásumri, tá ið ferðafólkastreymurin er størstur, heldur enn at bíða til seinni í ár?*

–Skipasýnið krevur, at eitt ferðamannaskip skal á beding einaferð um árið.

– Men tá ið tangatoppurin fór, høvdu vit eina avtalu við skipasýnið um, at tað skuldi gerast aftur, næstu ferð, Smyril fór í dokk og tað var í apríl, mei í ár.

Og tað varð góðtikið.

– Sostatt høvdu vit eina greiða avtalu við Skipasýnið og hana máttu vit halda.

Magnus Magnussen sigur, at hann veit ikki, um tað hevði loyst seg at søkt skipasýnið um loyvi at útseta arbeiðið eina tíð afturat.

– Men skulu vit alla tíðina reka okkara flota við undantaksloyvum frá Skipasýninum, verður tann kvota eisini uppbrúkt einaferð.

– Vit mugu eisini vísa, at vit hava ein vilja til at hava viðurskiftini í rættlag og at hava trygdina í lagi, sigur Magnus Magnussen.



*– Smyril verður liðugur á skipasmiðjuni tá ið vit hava avtalað, at hann skal vera liðugur, Og tað er týsdagin, sigur Magnus Magnussen, tekniskur stjóri á Strandferðsluni*

# Avloysaraskip fyri Smyril má á fíggjarlógina

ÁKI BERTHOLDSEN

–Tað er neyðugt, at eitt avloysaraskip fyri Smyril kemur beinleiðis á fíggjarlógina.

Hetta var ein niðurstøða á samferðslufundinum, sum Suðuroyar Kunningarstova skipaði fyri nú ein dagin herfyri.

Suðuroyar Kunningarstova hevði boðað umboðum yri øllum bý- og bygdaráðunum í Suðuroynni, umframt løgtingsmonnunum fyri Suðuroynna, til fundar at tosa um samferðsluviðurskiftini ímillum Havnina og Suðuroynna.

Fundurin er ein avleiðing av teimum ótryggu viðurskiftunum, sum ár eftir ár stinga seg upp, hvørja ferð, Smyril skal á beding til eftirlit- og tað er einaferð um árið.

Næstan hvørt á er heilt til tað síðsta stórt ivamál um, hvat skip fæst at røkja suðuroyarsiglingina ta tíðina, Smyril er í dokk.

Onkuntíð hevur Dúgvan siglt, men tað eru suðuroyingar so misnøgdir um, tí hon nøktar ikki tørvin, at Tvøroyrar Býráð hevur beinleiðis samtykt, at hon fær ikki keipláss á Tvøroyri.

Tað eina árið var tað í síðstu løtu, at Norrøna fekst at røkja siglingina. Og í ár hevur Strandferðslan leigað Claymore, sum verri enn so nøktar tørvin og sum tí eisini hevur elvt til misnøgd yvirhøvur- og ruðuleika inn ímillum.

Men á samferðslufundinum varð eisini tosað um framtíðar samferðsluna ímillum Suðuroynna og meginøkið.

### Má á fíggjarlógina

Á samferðslufundinum var full semja um, at viðurskiftini í samband við árliga eftirlitið hjá Smyrli, eru als ikki nøktandi.

Tí heitti fundurin á løgtingsmenninar um at kanna møguleikarnar fyri at seta játtanina til eitt avloysaraskip fyuri Smyril beinleiðis á fíggjarlógina, tí so kundi ongin ivi vera um, at peningur var tøkur til endamálið. Og sostatt skuldi Strandferðslan ikki aftur komið í hesa støðuna, at eitt vælhóskandi hóskandi avloysaraskip glapp henni av hondum, tí hon hevði ikki ráð til at leiga tað.

–Farleiðin ímillum Suðuroynna og Havnina er landsvegurin hjá suðuroyingum til miðstaðarøkið.

– Og eins og onnur vegastrekki í landinum, eigur hetta „vegastrekki“ eisini var verða røkt og hildið á einum tryggum støði, var niðurstøðan á fundinum.

Á fundinum varð eisini ynski sett fram um, at fleiri túrar blivu við tyrluni ímillum Suðuroynna og Havnina.

Eitt nú varð tosað um at fáa túrin sunnumorgin aftur.

Fyrr varð eisini flogið til Suðuroy sunnumorgnar, men hesin túrurin er nú avtikin.

Men fundurin fegnaðist eisini um, at skjøtil er settur á arbeiðið at útvega eitt nýtt skip fyri Smyril.

Og semja var um, at skipið, sum ætlanin er at byggja, og sum suðuroyingar vórðu kunnaðir um á almennum fundi í september í fjør, verður ein stórur bati.

Sostatt hava suðuroyingar slept kravinum um, at fáa tvíkilju at sigla ímillum Suðuroynna og Havnina.

Suðuroyingar hava havt umboð í nevndini, sum fyrireikar nýggjan Smyril og tann nevndin er nú samd við Strandferðsluni í, at eitt vanligt skip er tann besta loysnin, tí ein tvíkilja avlýsir ov nógvar ferðir fyri veður.

Á fundinum varð fullkomilig semja um, at nýggi Smyril skuldi vera álitið í ferðasambandinum ímillum Suðuroynna og Havnina.

Men alt, sum kundi koma afturat fyri at økja túrataliðvar kærkomið.

Og á tí økinum brutu suðuroyingar eitt tabu, sum teir hava hildið rættiliga fast um í fleiri ár. Og tað er tankin um at eisini at hava eitt skip at sigla ímillum Hvalba og Sandoynna afturat Smyrli.

Hesin tankin hevur verið bannlýstur í Suðuroynni, men á hesum fundinum vóru fleiri, eisini løgtingsmenn fyri Suðuroynna, sum nevndi hetta sum ein møguleika at fáa fleiri túrar. afturat Smyrli.

# Fann fløskupost í Tjaldavík



*Herfyri fann Sólva T. Rúnadóttir á Tvøroyri ein fløskupost, sum hevur rikist í sjónum í hálvtannað ár*

Tað kemur meiri enn so fyri, at fløskupostar reka á land í Føroyum. Og tað kemur eisini fyri, at lívlangt brævaskiftið og vinalag spyrst burturúr hesum fløskupostum.

Men, hvussu tað fer at roynast hjá átta ára gomlu Sólvu T. Rúnadóttir av Tvøroyri er ov tíðliga at siga nakað um enn.

Nú ein dagin í góðveðrinum herfyri var hon farin við ommuni og abbanum og tveimum systkinabørnum yvir í Tjaldavík við gørnum. Meðan gørnini stóðu fóru tey upp á hólmin ein túr og í mølini har fann hon eina klára fløsku við onkrum í. Tá ið málið varð kannað nærri, vísti tað seg at vera ein fløskupostur.

Og hann kemur heilt úr Noregi. Tað er ein drongur í Oslo, sum eitur Henning, ið hevur sent fløskupostin beint fyri at hann fylti 11 ár í desember í 1998.

Sostatt hevur fløskuposturin ligið hálvtannað ár í sjónum, nú hann varð funnin.

Sólva T. Rúnadóttir ætlar sær nú at skriva til Henning og fortelja honum, at hon hevur funnið postin.

*–Áki–*





*Samstarvsráðharrarnir í Finnlandi, Íslandi og Noreg vóru mikudagin útferð við Norðlýsinum. Í tí viðbrekna fullveldismálinum tykjast teir vera í sama báti. Úr stýriborði finski verjumálaráðharrin, Jan Erik Enestam íslendski umhvørvisráðharrin, Siv Friðleifssdóttir og norski arbeiðaramálaráðharrin Jørgen Kosmo.*

**Mynd: Jens Kristian Vang**

# Norðurlond varin í fullveldismálinum

*Fullveldið er eitt innanhýsismál millum Føroyar og Danmark. Støða Føroya kann ikki sammetast við støðuna hjá baltisku londunum, tá ið tey loystu. Tað halda norðurlendsku samstarvsráðharrarnir úr Norra, Íslandi og Finnlandi, sum hava verið í Føroyum hesa vikuna*

Dánjal Højgaard

Boðskapurin er greiður.

Føroyingar mugu sjálvir avgera framtíð sína. Uttan uppílegging frá grannalondunum.

Tað halda tríggir norðurlendskir ráðharrar, sum hava verið á fundi millum norðurlendsku samstarvsráðharrarnar í Føroyum hesa vikuna.

Spurningurin um framtíðarstøðu Føroyar hevur kortini ikki verið umrøddur á fundinum.

- Hetta er ikki rætta forum at viðgera slíkt mál, slær íslendski ráðharrin, Siv Friðleifsdóttir, fast.

Kortini eru ráðharrarnir úr Íslandi, Noreg og Finnlandi sinnaðir at gera viðmerkingar til, hvussu tað er at vera granni hjá einum landi, har stýrið ætlar sær fullveldi.

### Virða úrtslitið

Finski ráðharrin, Jan Erik Enestam, sigur, at spurningurin um ein sjálvstøðugan føroyskan stat ongantíð hevur verið viðgjørdur í finsku stjórnini.

- Finnland hevur yvirhøvur ikki viðgjørt hendan spurningin. Hetta er eitt mál, sum einans viðvíkur Føroyum og Danmark, og vit virða tað úrtslit, sum kemur burturúr, sigur Jan Erik Enestam, sum umsitir verjumál í finsku stjórnini.

- Hetta er ikki eitt mál sum finska stjørnin eigur at leggja seg út í, leggur hann afturat.

### Innanhýsis mál

Í Íslandi hevur forsætisráðharrin eftir fyrispurningi úr Altinginum játtað at mekla millum Føroyar og Danmark, gerst tað neyðugt. Íslendski ráðharrin, Siv Friðleifsdóttir leypur kortini ikki framav.

- Hetta er eitt innanhýsismál, sum føroyingar sjálvir viðgerð nú. Vit skulu ikki leggja okkum beinleiðis út í hetta. Hetta er eitt mál, sum føroyingar sjálvir mugu taka støðu til, sigur Friðleifsdóttir, sum umsitir umhvørvismál í íslendsku stjórnini.

### Viðkemur ikki okkum

Norski ráðharrin, Jørgen Kosmo, heldur, at spurningurin um føroyskt fullveldi hevur einki við Noreg ella norðurlond at gera sum so.

- Hetta málið viðkemur okkum ikki. Hetta avgera føroyingar sjálvir. Hetta er hvørki eitt mál fyri norðurlond ella fyri Noreg. Hetta málið mugu føroyingar og Føroyar loysa í samstarvi við Danmark, sigur Kosmo, sum umsitir arbeiðaramál í norsku stjórnini.

- Viðurskiftini millum Noreg og Føroyar verða ikki broytt um Føroyar fáa fullveldi ella halda fram saman við Danmark, sigur Kosmo.

### Ikki sum Baltalond

Umboð fyri landsstýri hava í donskum fjølmiðlum tengt sjálvstýristilgongina í Føroyum saman við hana í baltisku londunum. Sagt hevur verið, at stívrenda danska støðan er í andsøgn við ta hjálp, danir í síni tíð veittu baltum, tá teir loystu frá gamla Sovjettsamveldinum.

Men samstarvsráðharrarnir í Íslandi, Noreg og Finnlandi tykjast at halda lítið um samanberingina hjá landsstýrisumboðunum.

- Hatta er hvør sítt. Baltisku londini vóru hertikin av Sovjettsamveldinum undir kommunismuni, og søguliga bakgrundin hjá Føroyum er jú ein onnur, sigur norski ráðharrin, Kosmo.

Finski ráðharrin, Enestam, sum eisini umsitir tey sonevndi nærøkini hjá Finnlandi - Russland og baltalond, dámar sera illa spurningin.

- Hevur tú okkurt skilagott at spyrja um, so skal eg svara. Men hesum kjakinum vil eg ikki vera við í. Hetta viðkemur slett ikki Finnland. Vilja føroyingar hava loysning so er tað í lagi fyri Finnland. Vilja teir ikki tað, er tað eisini í lagi fyri okkum.

Íslendski ráðharrin, Siv Friðleifsdóttir, tekur undir við norska starvsbróðuri Kosmo. Føroyar og baltalond eru hvør sítt heldur hon og hevur hug at slætta sjógv:

- Vit eru so mikið fólkalig í norðurlondum, at vit fara ikki at leggja okkum út í eitt innanríkismál, sum her er talan um. Føroya fólk má avgera, hvat tað vil í hesum stóra máli. Tað hevði ikki verið til gagns fyri nakran, um onnur lond av álvara koma upp í leikin, sigur hon.

### Einki verður broytt

Spurninguri er um tað fær nakrar avleiðingar fyri samstarvið millum norðurlond, um ríkisrættarliga støða Føroya verður broytt.

Norski ráðharrin heldur ikki, at hetta fer at hava nakran praktiskan týdning fyri samstarvið.

- Avleiðingarnar vera sera smáar. Føroyar taka sum er lut í norðurlendska samstarvinum, og hetta fara tær eisini at gera, um so er at tær vera eitt sjálvstøðugt ríki. Eg vænti ikki at hetta fer at hava nakran praktiskan týdning, sigur Kosmo.

- Norðurlond eru friðarlig lond, har demokratiið valdar. Vit tosa saman um allar trupulleikar, sigur hann.

Og finski ráðharrin, Enestam er púra samdur:

-Eg dugi ikki, at sígga, at tað fer at gera nakran mun, um vit fáa eitt norðurlendskt ríki afturat. Tað hevur ongan stórvegis týdning.

Íslendski ráðharrin, Friðleifsdóttir, heldur hinvegin, at spurningurin um leiklut Føroya í norðurlendskum høpi er ikki so einfaldur at svara:

- Hetta veldst um, hvørja støða føroyingar fáa í Norðurlandaráðnum og norðurlendska ráðharraráðnum. Tað verður sjálvsagt ein samráðingarspurningur.

- Sjálv haldi eg, at vera Føroyar eitt sjálvstøðugt ríki so er tað púra nattúrligt, at tær fáa sjálvstøðuga umboðan í Norðurlandaráðnum í ráðharraráðnum, sigur hon.

